Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 8 · FO-355 Vestmanna

Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

# Leiðreglur um lán og brúk av høllini hjá Vestmanna kommunu

Hesar leiðreglur skulu tryggja at feløg, borgarar, fyrisiting, stovnar o.o. hava greiðar reglur fyri lán og brúk av høllini v.m.

**Stk. 1**. Endamálið er at tryggja, at høllin verður nýtt so munagott og skynsamt sum gjørligt og styðja upp undir eitt virkið ítrótta- og frítíðarvirksemi í kommununi. Harumframt at stuðla og eggja til ein virknan lívsstíl við rørslu og felagsskapi.

**Stk. 2.** Umframt hesar leiðreglur kunnu serstakar reglur ásetast í avtalu.

## § 1. Ásetingar um tillutan av hallartímum

Tillutanin av tímum í høllini tekur støði í høvuðsendamálinum (sí vestmanna.hallir.com)

**Stk. 1.** Tíðir, ið ikki eru í brúk, verða gjørdar tøkar á vestmanna.hallir.com

**Stk. 2.** Tey, sum hava fingið tillutaðar hallartíðir, eiga uttan drál at fara inn í skipanina og melda frá, um einstakar tíðir ikki verða brúktar ávísa ferð ella sum heild.

## § 2. Raðfesting í sambandi við tillutan av føstum hallartíðum

1. Skúlar
2. Feløg við ítróttavirksemi fyri børn og ung
3. Feløg við ítróttavirksemi fyri vaksin
4. Dagstovnaøkið og eldraøkið

Feløg heimahoyrandi í Vestmanna hava framíhjárætt at brúka høllina.

## § 3. Avmarkingar

Brúkarar mugu tola, at tað kann koma fyri, at tillutaðar tíðir verða tiknar aftur í samband við ávísar kappingar, stevnur, val o.a. Fráboðanir verða givnar so stundisliga sum gjørligt. Harumframt kann talan verða um, at tillutaðar tíðir verða tiknar aftur í samband við umvælingar og aðrar bráðfeingis støður.

## § 4. Stongt í samband við halgidagar og halgidagslóggávu

- Nýggjársdag
- Páskadag
- Hvítusunnudag
- Jólaaftan
- Jóladag
- Nýggjársaftan frá kl. 12

**Stk. 2**. Ikki er loyvt at nýta hølini í stríð við halgidagslógina. Í kirkjutíð (kl. 10:30 – 12:00) er ikki loyvt at skipa fyri tiltøkum ella venjingum.

Vestmanna Kommuna
Bakkavegur 8 · FO-355 Vestmanna

Tlf. 770 100
vestmanna@vestmanna.fo
www.vestmanna.fo

## § 5. Gjald fyri hallarleigu

Høllin verður sett til taks við ljósi, hita, skiftingar-, brúsurúmum og reingerð.

**Stk. 1**. Um ikki onnur avtala er gjørd, skal rindast frammanundan gjøgnum skipanina. Gjald fyri møguliga eyka tænastur verður avtalað frammanundan ella avroknað aftaná.

**Stk. 2**. Brúkarar av høllini kunnu áleggjast endurgjaldsábyrgd í sambandi við misrøkt av hølunum. Herundir um hølir ikki verða læst sambært galdandi ásetingum, og um tað ikki verður tikið upp eftir sær.

## § 10. Skilhald o.a.

Venjing má bert fara fram í sjálvari høllini. Í forhøll, skiftingarrúmum og gangum er bóltspæl og onnur venjing bannað.

***Vit skulu øll lata høllini aftur í sama standi, sum vit fingu hana.***

**Stk. 1.** Takast skal væl upp eftir brúk, og farast skal væl um høllina.
**Stk. 2.** Allir brúkarar skulu virða amboðini hjá øðrum.
**Stk. 3.** Ikki er loyvt at roykja innandura.
**Stk. 4**. Leigarin hevur ábyrgd av, at brúkarar halda ásettu reglurnar.
**Stk. 5.** Ítróttafeløg hava skyldu til at gera klárt til dystir og rudda av aftur. Áskoðarapláss skulu ruddast og skiftingarrúm skulu verða ruddað til næsta brúkara.
**Stk. 6**. Ítróttafeløg hava skyldu til, at venjarin tekur ábyrgdina av leikarunum og tryggjar at stk. 1. - 5. verða hildin.
**Stk. 7.** Allir leigarar, tað veri seg feløg við limum ella teirra áskoðarar, skulu til eina og hvørja tíð rætta seg eftir ávísingum frá hallarvørði. Verða ávísingarnar ikki fylgdar, hevur leiðslan fyri høllina rætt til uttan ávaring at nokta einstaklingum eins væl og feløgum atgongd til høllina.
**Stk. 8**. Skilhaldsreglur kunnu verða hongdar upp og verða tillagaðar til hvørt høli.
**Stk. 9**. Avleiðing av broti á skilhaldsreglur kunnu í síðsta enda elva til burturvísing av persóni, liði ella felagi.

## § 12. Ábyrgd og trygging

Fyri pengar, klæðir ella virðislutir annars átekur høllin sær onga ábyrgd.

## § 13. Gildiskoma

Hesar leiðreglur koma í gildi tann 1. oktobur 2024.

Samtykt av Vestmanna Bygdarráð tann 28. august 2024

Bjørg á Røgvi, borgarstjóri